# GÍ fingið nýggjan formann

**– Tað er trupult vera primus-motor í einum ítróttarfelag í longri tíð, samstundis sum tú skalt passa títt arbeiði, sigur Brandur Jacobsen, sum legði frá sær sum formaður í GÍ á aðalfundinum týskvøldið. Nýggja nevndin hevur skipaðseg viðJanusi Ramussen sum formanni**

FÓTBÓLTUR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Týskvøldið hevði Gøtu Ítróttarfelag ársaðalfund, og har boðaði Brandur Jacobsen frá, at hann leggur frá sær sum formaður. Stundir eru ikki til at halda fram sum formaður í GÍ.

– Tað krevur sera nógva orku at reka eitt ítróttarfelag, um tú ætlar tær at verða viðí fremstu røð, og taðer trupult vera primus-motor í einum ítróttarfelag í longri tíð, samstundis sum tú skalt passa títt arbeiði, sigur Brandur Jacobsen.

### Hevði brúk fyri steðgi

Brandur hevur veriði nevndini hjá GÍ í fýra ár, og seinasta áriðhevur hann veriðformaður.

–Felagið var komiðilla fyri fíggjarliga, og taðhevur kravt nógv av okkum at fáa tilpassa felagið aftur. Og tá ið tað samstundis gongur so illa ítróttarliga, sum taðgjørdi í fjør, so verður taðsera tungt, sigur Brandur Jacobsen.

Fráfarni formaðurin heldur tó, at tað hevur veriðein spennandi tíðat sitiði nevndini í GÍ.

–Hesi fýra árini hava veriðsera spennandi og hendingarík, men nú eri eg komin hartil, at eg havi brúk fyri einum steðgi, sigur Brandur Jacobsen.

### Janus formaður

Nýggj nevnd var vald á aðalfundinum týskvøldið, og í henni sita Janus Rasmussen, Elias Hansen, Halldóra Ranghamar, Jeffri Olsen og Andrias Petersen.

Halldóra Ranghamar og Andrias Petersen eru nývald.

Nevndin skipaði seg mikukvøldið, og nýggjur formaður í GÍ er Janus Ramussen. Hann var í 90'unum partur av GÍ-liðnum, sum vann fýra FM-heiti á rað, og hann hevur eisini spælt nakrar landsdystir fyri Føroyar.

Elias Hansen er næstformaður, Halldóra Ranghamar peningarøkil, Jeffri Olsen skrivari og Andrias Petersen nevndarlimur.



*– Tað krevur sera nógva orku at reka eitt ítróttarfelag, um tú ætlar tær at verða viðí fremstu røð, sigur fráfarni GÍ-formaðurin, Brandur Jacobsen*

## Start hevur ov nógvar skaðar

**Fyrrverandi norskur landsliðsvenjari heldur, at fleiri av skaddu spælarunum hjá Start mugu koma skjótt fyri seg, um felagiðskal kunna blanda seg í toppin í Tippuliguni í ár**

FÓTBÓLTUR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*




*Todi Jónsson er ein av spælarunum hjá Start, sum hevur veriðdarvaður av skaða seinastu vikurnar, men taðgongur rætta vegin hjá honum*

Norska felagiðStart er plágaðav nógvum skaðum millum sínar spælarar. Fleiri av stuðulsspælarunum hava ikki kunnaðsum vanligt seinastu tíðina, tí teir hava veriðskaddir, og stundum hevur skaðalistin veriðsera langur.

Ein av teimum, sum hevur drigist viðskaða, er føroyski landsliðsspælarin Todi Jónsson, men hjá honum gongur rætta vegin.

Fyrrverandi norski landsliðsvenjarin Nils Johan Semb var á La Manga herfyri og tosaði viðfeløgini um talentmenning, og hann var millum annaðtil venjing hjá Start.

– Start virkar merkt av, at fleiri av spælarunum ikki eru í toppformi enn. Hópurin sær góður út, men skal felagiðblanda seg í toppin, so mugu lyklaspælarar koma skjótt fyri seg aftur, sigur Nils Johan Semb viiðFedrelandsvennen.

### Byrja aftur

Týðandi spælarar sum Marius Johnsen, Fredrik Strømstad og Atle Roar Håland hava veriðskaddir, og teir hava nakaðat heinta næstu vikurnar.

– Nógvir skaðar minka um styrkina hjá Start, eingin ivi um tað, sigur Nils Johan Semb.

Sunnudagin skal Start í eldinaftur, tá iðnorðurlendska kappingin Royal League byrjar aftur eftir vetrarsteðg. Start skal í dystinum sunnudagin spæla ímóti svenska liðnum Hammarby, og dysturin verður spældur á Søderstadion í Stockholm.

Skal Start hava møguleika at koma víðari í kappingini, skal felagiðvinna dystin sunnudagin og ein dyst ímóti FC Midtjyllandi seinni.

## Claus spældi ein hálvleik



*Coventry-venjarin sendi Claus Bech Jørgensen á vøllin fyri at venda steypadystinum ímóti Middlesbrough, men taðendaði viðeinum teprum tapi*

**Coventry-venjarin setti Claus Bech Jørgensen á vøllin í hálvleikinum í steypadystinum ímóti Middlesbrough, men hann og liðfelagarnir kláraðu ikki at javna leiðsluna hjá Middlesbrough**

FÓTBÓLTUR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Mikukvøldiðdystaðist føroyski landsliðsspælarin Claus Bech Jørgensen ímóti Premier League-stjørnunum í Middlesbrough.

Coventry, sum spælir í næstbestu ensku deildini, spældi ímóti Middlesbrough í steypakappingini, og dysturin endaði við1-0 sigri til Middlesbrough. Hetta var ein umdystur á heimavøllinum hjá Middlesbrough, tí fyrri dysturin millum feløgini, iðvar á heimavølli hjá Coventry, endaði viðjavnleiki.

Claus Bech Jørgensen var á beinkinum hjá Coventry frá byrjan, men eftir at Jimmy Floyd Hasselbaink hevði lagt Middlesbrough á odda í fyrra hálvleiki, vildi venjarin hjá Coventry hava eitt meira álopssinnaðliðá vøllin eftir steðgin.

Hetta hevði viðsær, at Claus Bech Jørgensen varðsettur inn frá fyrsta bríksli í seinna hálvleiki.

### Einki mál afturat

Men hóast Coventry royndi at leggja alt meira fyri fram eftir vøllinum, eydnaðist teimum ikki at fáa útjavnandi málið. Einki mál kom afturat í hesum dystinum, og tí er Coventry úti av ensku FA Cup.

Stóra stjørnan há Coventry seinastu vikurnar, 39 ára gamli Dennis Wise, var ikki viðí hesum dystinum, Venjarin hevði valt at spara tey gomlu beinini, eftir ein strævnan dyst um vikuskiftið.

Møguleiki skuldi veriðfyri, at Claus Bech Jørgensen sleppur at spæla viðí næsta dystinum, tí spælarin, sum hann avloysti á miðvøllinum, hevur leikbann í næsta dystinum.